# 20 av teimum størru – VINNINGUR

**"Fyri at meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina"**

# Innihaldsyvirlit


Um frágreiðingina: ..... 3

Endamál ..... 3

Útvald roknskapartøl fyri 2013 – 2017 ..... 3

Fíggjarfeløg ..... 3

Altjóða feløg ..... 3

Avmarkingar og frávik ..... 3

Tey útvaldu lyklatølini ..... 4

EBIT ..... 6

Samlað EBIT ..... 8

Ársúrslit ..... 9

Samlað ársúrslit ..... 11

Lyklatøl ..... 12

Altjóða samanbering ..... 13

Fyrivarni ..... 14

# Um frágreiðingina:

## *Endamál*

Endamálið við hesi gjøgnumgongdini er at eyðmerkja ta fíggjarligu gongdina, framgongd og kós sum tey størstu føroysku feløgini hava havt í tíðarskeiðnum.

Hetta verður gjørt við at hyggja at útvaldum lyklatølum og samanhalda hesi við undanfarin ár, og í ávísum førum, eisini við gongdina í útlandinum.

## *Útvald roknskapartøl fyri 2013 – 2017*

Greiningin er gjørd út frá almennu ársfrásøgnunum fyri 2013 – 2017. Tey feløgini, ið eru vald út, upplýsa í ársfrásøgnini umsetningin hjá felagnum, og ið fleiri førum er talan um ein samtaksroknskap.

Í frágreiðingini eru tey 20 feløgini vald út, sum hava hægst umsetning fyri tíðarskeiðið 2013 – 2017.

Hetta viðførir eisini, at feløg, sum ikki upplýsa umsetningin, men sum hava hægri umsetning enn hesi feløgini, ikki verða tikin við í greiningini.

## *Fíggjarfeløg*

Fíggjarfeløg og peningastovnar eru ikki við í greiningini.

## *Altjóða feløg*

Gjøgnumgongdin inniheldur eina samanbering við lyklatøl hjá útlenskum feløgum. Tá er talan um Danmark (C25), Svøríki (OMX S30), Noreg (OBX 25), Týskland (DAX 30), og Ongland (FTSE 100).

Hetta er gjørt fyri at fáa betri samanberingartøl og hareftir eisini til at meta um gongdina fyri tey føroysku feløgini. Tað skal viðmerkjast í hesum sambandinum, at Bakkafrost er eisini partur av OBX 25 í Noregi.

Tilfar í tí sambandinum er innheintað frá Price Waterhouse Coopers, Danmark, ið hevur tilfarið frá S&P Capital IQ.

### Avmarkingar og frávik

Fyrsta roknskaparár hjá P/F Pelagos var í 2014, 27. januar – 31. desember, hetta viðførir frávik í tølunum.

Allar fyritøkurnar ið eru tiknar við í greiningini hava álmanakkaárið sum roknskaparár, tískil hevur ikki verið neyðugt at gjørt tillagingar í tí sambandinum.

Roknskaparviðgerðin hjá teimum ymisku feløgunum, kann verða ymisk, eins og tað eru munir millum virksemisøkir, sum viðføra, at ein beinleiðis samanbering ikki er møgulig. Tað eru ikki gjørdar tillagingar fyri serlig virksemis- ella vinnugreina viðurskifti.

Gjøgngumgongdin er gjørd við útgangsstøði í umsetningi, og eru tølini fingin til vega frá Vinnuvitan.Biz, og eru øll tølini almenn atkomilig.

# Tey útvaldu lyklatølini

Hetta er onnur frágreiðingin í eini røð. Fyrsta frágreiðingin, sum varð almannakunngjørd 2. november 2018, viðgjørdi umsetning. Eftir hesu frágreiðingini, sum umrøður vinning, er ætlanin at koma við øðrum frágreiðingum, sum fara at viðgera onnur útvald lyklatøl. Ætlanin er tí, at tá ið allar frágreiðingarnar eru almannakunngjørdar, so eru hesi lyklatøl viðgjørd:

- Umsetningur
- Vinningur
- Íløgur
- Skuld
- Starvsfólk
- Eginogn

Hendan røðin fer at enda við einari frágreiðing, sum tekur saman um.

Framtíðarætlaninar við hesum frágreiðingum er, at tær skulu dagførast árliga soleiðis, at hesar frágreiðingar kunnu verða eitt amboð at eyðmerkja ta fíggjarligu gongdina, framgongd og kós hjá teimum størstu føroysku feløgunum.

Tey fFeløgini, ið eru við í greiningini, eru nevnd á næstu síðu.

## EBIT

*EBIT (Earning before interest and tax): EBIT umfatar rakstrarúrslit, sum er úrslit áðrenn rentur og skatt.*

8 av 20 høvdu eina øking í EBIT fyri 2017 (2016: 14). Tað er vert at leggja til merkis, at meira enn helmingurin av feløgunum, hava havt eina minking í EBIT fyri 2015 og 2017.




(fig. 1.1: Fyrsta roknskaparár hjá Pelagos varð í 2014, og tískil inngongur felagið ikki í 2013 ella 2014 í talvuni omanfyri. P/F Tjaldur gjørdi ikki konsernroknskap í 2012, og tískil inngongur P/F Tjaldur heldur ikki í 2013)

| Størst vøkstur í EBIT 2017 | Vøkstur |
|---|---|
| PELAGOS | 157,6% |
| FAROE SHIP | 99,6% |
| MEST | 15,2% |

Pelagos hevði størsta vøksturin í EBIT fyri 2017, vøksturin hjá felagnum varð á 157,6% - samlað fyri øll 20 feløgini í 2017 er talan um eina minking á 38,0%.

Samlaða er EBIT lækkað støðugt í tíðarskeiðinum 2013 – 2015. Í 2016 var ein samlað øking í EBIT  uppá 60,3%, men í 2017 var ein minking uppá 38,0%.



## Samlað EBIT

Í tíðarskeiðnum í 2013 – 2017 er EBIT økt úr 1,6 mia.kr. til 1,9 mia.kr.




EBIT fyri tey størru feløgini varð í 2017 1,9 mia.kr. (2016: 3,1), og svarar hetta til eina minking á 38,0% (2016: øking á 60,3%)

| Gongdin í EBIT, samlað | 2016 | 2017 |
|---|---|---|
| **EBIT (mia.)** | 3,1 | 1,9 |
| **Samlaður vøkstur** | 60,3% | -38,0% |

## Ársúrslit

7 av 20 høvdu eitt økt ársúrslit fyri 2017 (2016: 14). Tað er vert at leggja til merkis, at meira enn helmingurin av feløgunum, hava økt ársúrslitið í árunum 2013 - 2016.




(fig. 1.1: Fyrsta roknskaparár hjá Pelagos varð í 2014, og tískil inngongur felagið ikki í 2013 ella 2014 í talvuni omanfyri. P/F Tjaldur gjørdi ikki konsernroknskap í 2012, og tískil inngongur P/F Tjaldur heldur ikki í 2013)

| Størst vøkstur í ársúrsliti 2017 | Vøkstur |
|---|---|
| FAROE SHIP | 454,8% |
| PELAGOS | 187,1% |
| FØ. TELE | 17,0% |

Faroe Ship hevði størstu framgongdina í ársúrslitinum fyri 2017, økingin hjá felagnum var 454,8% - samlað fyri øll 20 feløgini í 2017 er talan tó um eina lækking uppá 39,4%.

Samlaða økingin í ársúrslitum lækkaði frá 115,6% í 2013 til 10,1% í 2014. Í 2016 var økingin 60,3%, fyri síðani at lækka í 2017 við -39,4%.



## Samlað ársúrslit

Samlað ársúrslit hevur í tíðarskeiðnum í 2013 – 2017 er økt úr 1,3 mia.kr. til 1,6 mia.kr..




EBIT fyri tey størru feløgini varð í 2017 1,9 mia.kr. (2016: 3,1), og svarar hetta til eina lækking á 38,0% (2016: øking á 60,3%).

| | 2016 | 2017 |
|---|---|---|
| **Ársúrslit (mia.)** | 2,6 | 1,6 |
| **Samlaður vøkstur** | 60,3% | -39,4% |

## Lyklatøl

Í roknskapargreiningini frá 2. november 2018, varð umsetningurin hjá 20 teimum størstu feløgunum greinaður. Út frá teimum tølum, verður í hesi greiningini hugt at, hvussu stórur %-partur av umsetninginum liggur eftir, tá ið hugt verður at EBIT og ársúrsliti.

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Umsetningur (mia.)** | 10,1 | 11,3 | 12,0 | 12,5 | 13,2 |
| **EBIT %-partur av umsetninginum** | 15,9% | 17,2% | 16,1% | 24,8% | 14,5% |
| **Ársúrslit %-partur av umsetninginum** | 12,9% | 12,7% | 13,5% | 20,8% | 11,8% |

Talvan vísir, at EBIT %-parturin av umsetninginum í tíðarskeiðnum hevur ligið millum 14,5% - 17,2%, tó við undantaki av 2016, har ið EBIT %-parturin av umsetninginum var 24,8%.

Tað sama mynstrið er galdandi fyri %-partin av ársúrslitinum samanhildið við umsetningin, har ið tølini eru støðug, tó við undantakið av 2016. Ársúrslit í % av umsetninginum lá millum 11,8% - 13,5%, men var tó 20,8% í 2016.

Tað vil siga, fyri hvørjar 100 kr., sum tey 20 feløgini høvdu í umsetningi í 2017, lógu 11,80 kr. eftir á botnlinjuni, í miðal.

## Altjóða samanbering

Samlað ársúrslit - indeks samanbering (2013=100)

Verður samanhildið við onnur lond, so hava føroysku feløgini havt eina minni øking í ársúrslitinum í 2017. Í 2017 høvdu tey 20 feløgini í Føroyum eitt indeks á 120, ímeðan Danmark, Noreg, Svøríki, Týskland og Ongland høvdu indeks, sum lá millum 128 – 193.



## Fyrivarni

Greiningin er bert gjørd sum ein almenn frágreiðing um viðurskifti, ið kunnu hava áhuga, og ikki sum yrkisráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá teimum upplýsingum, sum eru í greiningini, uttan at fáa aðra ráðgeving áðrenn. Vit lata onga váttan, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis, hvat viðvíkur rættleikanum í greiningini.